DAGSINS MEINING

Poul hevur byrjað valstríðið!

Komandi løgtingsval verður spennandi í Suðurstreymoy. Serliga kappingin í Fólkaflokkinum. Fyrrverandi býráðsformaðurin í Havn, Poul Michelsen, boðar nú frá, at hann stillar upp til komandi val. Eitt "um" er kortini við í fráboðanini. Og tað merkir, at hann stillar upp, "um" Fólkaflokkurin ikki finnur eitt annað "fullveldisvalevni". Í tí liggur so eisini: eitt nóg markant valevni á fullveldisveinginum!

Tað ger Fólkaflokkurin neyvan. Verandi tingmenn floksins í Suðurstreymoy, Óli Breckmann og Bjarni Djurholm, eru kanska sjálvstýrissinnaðir, men í orðaskiftinum um fullveldistilgongdina hava teir verið so íhaldssinnaðir, at fólk hava ofta skýrt teir fyri at vera sambandssinnaðar. Og tað ber ikki til, sum Poul Michelsen, so greitt vísir á í samrøðuni við Fregnir ígjár. Hann sigur, at Fólkaflokkurin kann ikki bæði tosa fyri loysing og sambandi. Og tí missir flokkurin trúvirði, heldur fyrrverandi borgarstjórin í Tórshavn.

Hesum hevur hann rætt í, men spurnartekin verður á hesum stað sett við áskoðanina um, at Fólkaflokkurin hevur bundið landsstýrið saman hesi trý árini, og sostatt er sterkasta liðið í fullveldisætlanini. Man Sjálvstýrisflokkurin ikki vera ketuliðið við tí sterka boltinum, sum hinir flokkarnir hava gnadda so nógv, at styrkin íboltinum er ivingarsom?

Líkamikið. Stillar Poul Michelsen upp, kann hann blíva valdur saman við svágrinum, Óla Breckmann. Væl at merkja, um Fólkaflokkurin fær tveir mans. Veljarakanningarnar hava verið alt annað enn góðar, men tær kunnu broytast. Harafturat er Poul ein "fight´ari". Hevur stórt bakland. Bæði innan ítrótt, í Klubbanum og innan handilsvinnuna.

Harafturat fer hann óivað at draga atkvøður bæði á beitinum hjá Tjóðveldosflokkinum, frá borgarligum tjóðveldisveljarum – hann er gamal tjóðveldis- og framburðsmaður – og harafturat er hugsandi, at ørkymlaðir sjálvstýris- og javnaðarveljarar fara at seta kross við fyrrverandi borgarstjóran í Havn. Mótvegis Anfinni Kalsberg, er hann ein "fight´ari", bakkar ikki fyri Nyrup sum Anfinn. Men hvørjar politiskar dygdir, hann annars hevur, vita vit ikki, tí hann markeraði seg ongatíð rættiliga sum landspolitikkara, tá hann sat í Løgtinginum. Og alt tað, sum hann avrikaði í síni býráðstíð var langt frá heppið. Valstríðið er byrjað. I hvussu er í Fólkaflokkinum!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Prosentfusk

Súsanna Dam

Hevur nakar loyst eplagátuna? Er húski Høgna einaferð aftur um at gerast offur fyri eini vælskipaðari herferð við manipuleraðum tølum og avskeplaðum procentum, sum púrt einki skil er í? Metir Høgni røttu tølini so ræðandi, at hann ikki torir at avdúka tey?

Hvat er tá ætlanin? Evsta vald á einum u-landi?

Hví ikki í sonnum frælsisanda boða frá, hvussu veruleikin sær út, og hvussu útlitini kunnu væntast at vera, og so lata fólk velja hvønn vegin tey fara. Eru ikki hesir óalítandi boðskapirnir, sum verða blakaðir út um geilar, tá alt kemur til alt, hin allarstørsta forðingin fyri, at nøkur broyting kann henda? Hin æviga biddaragongdin til Pól, kann ikki annað enn prógva, at Høgni innast inni als einki álit hevur á, at húski hansara megnar at uppihalda sær sjálvum, og tað er í mínum hugaheimi nógv meira eyðmýkjandi, enn hetta, at viðurkenna, at vit, sum nú er, eru ov fá, til at fáa eitt framkomið fólkaræði til at virka út í uttasta lið. Og hetta er ikki ein spurningur um meira ella minni av peningi, men um meira ella minni av mannarættindum, -evnum og -orku.

Hevði ikki verið hópin reiðiligari at sagt okkum, ella enn betur spurt okkum, hvar yvirflóðin skal skerast, tá ella um vit velja at fara úr ríkisfelagsskapinum, tí allir føroyingar eru púra greiðir yvir, at tá helvtin av setini restar, so verður ávøksturin helvtina minni. At siga annað er eftir mínum tykki bæði falsan og svik og ikki heilt rættsiktað.

Økismenning og Suðuroyggin!

Svenning Borg
Vágur

Aftaná fundin í VB–húsinum um økismenning trúgvi eg, at flest allir suðuroyingar fóru heim aftur við eini kenslu av, at hetta var mest líkt einum valfundi, øll politisku umboðini vóru fyri økismenning, tað stóð enntá í politisku valskránni hjá øllum politisku flokkunum um, at teir tóku undir við økismenning og eg spurdi meg sjálvan ímeðan eg sat har, hvat øll hesi fólkini gjørdu vesturí á Eiðinum hetta kvøldið. Hví neyðugt varð við hesum fundinum, øll politisku feløgini vóru jú fyri økismenning, so tað skuldi jú staðið væl til úti í teimum ymsu økjunum, so tað átti ikki at verið neyðugt við nøkrum økismenningarfundum. Men veruleikin er jú ein heilt annar. Eingin av politisku flokkunum hevur sýnt í verki nakra økismenning, tí varð øll vælvildin vesturí á okra vakra Vágseiði hetta kvøldið bert valagn.

Sitandi samgonga hevur sett eina rúgvu av nýggjum arbeiðsplássum í miðstaðarøkinum, samstundis sum teir siga seg vilja menna útjaðarin, álvaratos, meinar sitandi samgonga, at fjøldin er býtt? Hvar er nú útjaðarapolitikkurin hjá sitandi samgongu. Tað síggjast ongi úrslit í útjaðaranum, men allir siga seg vilja menna útjaðaran og leggja so alt tað almenna virksemið í miðstaðarøkinum.

Suðuroyingar sita kanska á eini stórari oljukeldu, men sitandi økismenningarlandsstýri hevur avgjørt, at suðuroyingar skulu einki hava við nakra oljuvinnu at gera. Teir eru ikki góðir nokk. Kunnu ikki brúkast, um teir búgva í Suðuroynni, men flyta teir til miðstaðarøkið at búgva, ja so kunnu teir brúkast.

Tað er har,ið stovnarnir verða lagdir, so má tað unga fólkið leita sær til miðstaðarøkið, um tey skulu hava arbeiði innan terra útbúgvingarøki. Stovnarnir verða ikki lagdir í miðstaðarøkinum, tí at fólkið er har frammundan. Nei, stovnarnir verða fyrst lagdir í miðstaðarøkinum, og so verður lýst eftir fólki. Soleiðis hava politikkarnir drenað útjaðarin fyri tað unga fólkið við útbúgving, og flutt hann til miðstaðarøkið. Tí er støðan soleiðis sum hon er.

Roynið og flytið almennu umsitingina út um landið, so fáa tygur at síggja, hvussu nógv,ið er eftir í høvuðsstaðnum. Sjálvur hevði eg roknað við, at høvuðsstaðurin hevði minkað við einum triðingi í hvussu er.

Eitt annað, ið nógv bleiv umrøtt, var kommunuskuldin. Men eitt skal eg vísa á, at um fíggjarmálastýrið lá her suðuri hjá okum, trúgvi eg ikki, at tildømis Vágs kommuna hevði eina krónu í skuld. So nógv av tí støðuni, sum okur eru komnir í, er bert grundað av, at landspolittikarnir hava verið ov vánaligir, og serliga teir fyri Suðuroynna. Tað sæst best á landavegunum á oynni. Tað er alment sligið fast, at Suðuroyggin hevur vánaligasta veg í Føroyum.

Oljuhavnin kundi ligið á Drelnesi, Oljumálastýrið í Vági og MRRC støðin í Akrabergi. So fingu suðuroyingar tað, ið veruliga tilkom teimum, at umsita tað, ið fyrigongst í teirra egna sjógvi. Men sitandi samgonga valdi at leggja hetta niður í miðstaðarøkinum. Tí eiga allir suðuroyingar at venda sitandi samgongu bakið, og ikki at velja teir aftur. Teir hava havt møguleikan, nú mugu aðrir sleppa at royna.

Í mínum hugaheimi hevur Suðuroyggin bert ein møguleika, og tað er, at yvirtaka alla umsiting av oynni. Oljuloyvi, aluloyvi og fiskaloyvi verða útskrivaði frá okra egnu umsiting, at okur stýra øllum tilfongi hjá oynni frá eini felagsumsiting. Leys frá restini av landinum.

Ein sjálvstýrandi Suðuroy, sum kanska er ríkasta oyggj í verðini.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Komandi ættalið offrað

Ingun Simonsen
skúlaleiðari

Tímajáttanin til skúlarnar er nú munnliga komin út á skúlarnar og er hon so nógv skerd, at ilt verður hjá flestu næmingum, bæði sokallaðum veikum og sterkum næmingum, at fóta sær úti í samfelagnum aftaná eitt áramál.

Tað eru 25 ár síðan eg sjálv fór út úr fólkaskúlanum í Havn. Samfelagið í dag er eitt heilt annað enn tá. Vit hava ment okkum á nærum øllum økjum, infrastrukturin er góður og livistandardurin høgur, samskifti við útheimin hevur ongantíð verið betri og fólk yvirhøvur eru betri og betri upplýst.

Hóast alla hesa framgongd og menning, tori eg at siga, at skúlin eg fór úr fyri 25 árum síðan var ein nógv betri skúli enn flestu skúlar í dag, hóast lógin ikki legði upp til tað hon leggur upp til í dag.

Sum næmingur fyri 20-25 árum síðan hugsaði tú ikki um lógir og tímar og eg havi satt at siga heldur ikki studera táverandi fólkaskúlalóg so gjølla, men tosi av erfaring, men tað er sjálvandi úr Havn.

Sigast skal, at bókliga veikir næmingar ikki fingu tað burturúr teir áttu, men hinvegin, teir vóru eisini í skúlanum tá. Og eg loyvi mær at ivast í, um hesir næmingar fáa tað burturúr í dag heldur, sum lógin annars leggur upp til.

Eg minnist tá ið realskúlin var endaliga avtkin, tá vóru fleiri næmingar, ið valdu realskúlan frá og ístaðin fóru í 8. flokk, tí hann var nógv meira spennandi sæð í eygunum á teimum ungu.

Í framhaldsdeildini høvdu vit høvi at velja okkum nærum tað okkum lysti. Vit høvdu, minnist meg rætt, høvi at velja tríggjar vallærugreinir og tær vóru fleiri at velja ímillum. Í dag hava næmingar í teimum smærru skúlunum so at siga bert høvi at velja fysik, kemi og týskt. Sjálv havi eg bert starvast í skúlaverkinum í 10 ár, og kann tí ikki sjálv meta um, yvir eitt langt tíðarskeið, men skúlaleiðarar og lærarar tosa dagliga saman og tað er einki dulsmál at skúlin í dag verður minni og minni prioriteraður.

Ein skúli úti á bygd við stórum hølistrupulleikum hevur tørv á fleiri tímum enn ein skúli við ongum hølistrupulleikum, tað skuldi ikki verið so torført at skilt, men tað tykist sum politikararnir als ikki skilja nakað sum helst.

Tá ið tímatalvan á einum skúla skal leggjast, eru nógv ting ein skúli má hava í huga. Vit fáa eitt pultstímatal og eitt tímatal fyri næmingar, ið hava brúk fyri serligum tørvi, síðstnevndu næmingar vóru sum oftast fluttir á Skúlan á Trøðni fyri nógvum árum síðan. Hesar næmingar hevur bæði nýggja fólkaskúlalógin og fólkaskúlalógin frá 1979 havt í huga í lógunum, at teir skulu vera í síni heimbygd og ganga í skúla saman við teimum tey eru vaksin upp saman við, men samstundis eiga teir at fáa tímar í seligum tørvi alt eftir individuellum tørvi.

Tað er altíð ynskiligt at ein flokkur ikki er ov stórur, hetta hevur mangan verið alment frammi og at næmingar í sama aldursbólki eru sjálv, er eisini, vil eg siga, ein mannarættur. Úti á teimum smáu skúlunum við hølistrupulleikum eru vit oftast noydd at leggja fleiri floksstig saman og í einum flokki kunnu ganga 21 næmingar hoyrandi til tríggjar ymiskar flokkar í einari alt ov lítlari stovu, sum allarhægst átti at rúma 10 næmingum, um gingið skal vera eftir fólkaskúlalógini. Fleiri av hesum næmingum hava brúk fyri serligum tørvi, summi meira enn onnur. Onkur næmingur, helst fleiri í einum bólki er, av sálarfrøðingi ella øðrum serfrøðingi, mettur at skulu hava stuðul allan skúladagin, men hesir næmingar fáa, um vit eru heppin, hægst 5 tímar um vikuna, ístaðin fyri 27 og aðrir fáa ongan tíma. Hølini eru smá og inniluftin ring og her skulu 21 børn og lærari húsast og royna at fáa sum mest burturúr.

Samfelag okkara er, sum eg áður var inni á, so mikið framkomið, at vit øll fullvæl vita, at fólk, sum manglar pláss og hartil er útsett fyri iltmangul ikki læra líka skjótt sum onnur, tey missa rætt og slætt hugin at læra og summi gerast beinleiðis sjúk og lærarin, sum jú eisini er eitt vanligt menniksja orkar heldur ikki at halda á innan fyri hesar karmar ár út og ár inn.

Tá ið nú einki er at gera við plásstrotið í bræði, smáu kommunurnar eru flest allar sera illa fyri fíggjarliga aftaná kreppuárini, tær hava ikki sama inntøkugrundarlag sum tær stóru, bæði tí færri fólk búgva á staðnum, men eisini tí at fleiri gjalda skatt aðrastaðir, sjómenn t.d., og Landsstýrið hevur beinleiðis sýtt kommun-unum stuðul til bygging av nýggjum skúlum, er annars ein annar møguleiki og tað er at hava færri børn inni í hvørjum høli, børnini kundu so møtt forskoti í skúla, men hetta ber tíverri heldur ikki til, tí tímarnir skúlarnir fáa tillutaðar frá Mentamálastýrinum eru ikki til tað, tað er jú ásett við lóg hvussu nógvar tímar hvør flokkur skal hava.

Heldur hetta óskil fram við ov lítlari játtan til fólkaskúlan, hava vit offra okkara børn á sparialtarinum og lærarar og leiðarar fara ein fyri og annar eftir, at rýma úr føroyska fólkaskúlanum, tí hetta heldur eingin til.

Hvat verður so endin á hesum so framkomna samfelag. **Óskúlaði og líkasæl ættarlið, sum vit ikki kunnu rokna við fara at takka okkum fyri „beinasemi".**

Her lekur veruliga millum teori og praksis.

Faklig forfylging

TÍÐINDASKRIV
Føroya Blaðmannafelag

Blaðmannafelagið hevði mikudagin fund um uppsøgnina av Eli Guttesen, blaðmanni á Dimmalætting. Vit eru ikki í iva um, at einasta orsøkin til uppsøgnina er leikluturin hjá Eli, sum nevndarlimur í FB í samband við sáttmálasamráðingarnar.

Greiðar ábendingar eru um, at her er talan um eina hevndaratsøkn.

Niðanfyristandandi niðurstøða varð gjørd á fundinum:

»Blaðmannafelagið metir uppsøgnina av einum journalisti á Dimmalætting at vera ógilduga.

Felagið staðfestir, at blaðmaðurin er uppsagdur vegna fakligt arbeiði fyri fakfelagið.

Ongin saklig orsøk er givin fyri uppsøgnina, og kann hon tí ikki skiljast ørvísi enn forfylging av einum nevndarlimi í Føroya Blaðmannafelag.

Málið er latið sakførara, og felagið umhugsar hvørji tiltøk verða sett í verk."

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg